Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Tólv tíðinda-sendingar hvørt døgn

**FJØLMIÐLAR.** Danska sjónvarpsrásin TV2 fer tann 3. apríl at senda tíðindasendingar 12 ferðir um døgnið.

Allar gerandisdagar fer rásin at hava tvær nýggjar tíðindasendingar seinnapart, umframt tíðliga á morgni og seint á kvøldi.

– Gerandisdagurin í Danmark broytist støðugt, og vit eru ikki øll eins. Øll arbeiða ikki um somu tíð, og tað hevur eisini ávirkan á, hvussu familjurnar hyggja í sjónvarp, sigur Jens Gaardbo, sum er tíðindastjóri hjá TV2.

Tað er fyri at nøkta teimum ymsu krøvunum hjá familjunum, at TV2 nú fer at senda so nógvar tíðindasendingar. Summar teirra verða stuttar, men 12 ferðir um dagin ber til at fáa tey týdningarmestu tíðindini frá rásini.

Í Føroyum eru sjónvarpstíðindi at síggja á SvF tríggjar ferðir um vikuna.



# Aftur til tíðina uttan litir

Aftur í ár fara fólk at gera eina nostalgiska ferð aftur í 60'ini, tá svart var svart, hvítt var hvítt. Tiltakið, sum er sera væl umtókt millum tey, sum vóru ung í 60'unum, verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn tann 14. og 15. apríl.

Fyri mong er hetta dagurin á árinum, tá tað ber til at fara rættiliga í býin og hugna sær saman við javnaldrum.

Í ár fara tríggir bólkar at spæla, og tei eru X-Rays, Enjoyers og Twilight.

Atgongumerkini til hesi tiltøku eru nú at fáa kring landið

# Ókendir Hendrix-sangir funnir

**TÓNLEIKUR.** Systur heimskenda gittarúrmælingin Jimi Hendrix hevur funnið nakrar sangir hjá Hendrix, sum ongantíð áður hava verið frammi. Hesir sangir eru funnir í eini goymslu í upptøkuhølunum Abbey Road.

– Vit hava funnið umleið 60 bond við tilfari, sum ikki hevur verið frammi áður. Nakað av tilfarinum eru heilt ókendir sangir, meðan annað eru sangir í útgávum, sum ikki hava verið frammi, sigur systur Hendrix, Jane.

Kenda upptøkuhøli í London hevur hýst nógvum kendum tónleikarum, og nakrar heimskendar útgávur eru gjørdar í hesum hølum.

Ætlanin er nú at útgeva Hendrix-sangirnar í einum pakka við fýra fløgum, veit tónleikaritið Q at siga.

Hetta útgáva kemur væntandi í september mánaði.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Wed 01. Mar. 1999
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** info@nordinst.aland.fi
**Reply to:** info@nordinst.aland.fi

TELDU-POSTURIN

# At vera eitt sjálvstýrandi oyggjaland í Europa

Áland hevur bert ein lim í finska ríkisdegnum. Hann, ið situr á sessinum í løtuni, eitur Gunnar Jansson og hevur umboðað Áland í finska tinginum í samfull 17 ár.

Og tað er eingin líkasælur lokalpatriotur, ið álendingar fýra val á rað hava sett at umboða seg í Helsingfors. Fyri uttan at umboða og fremja álendsk áhugamál hevur hann gjørt seg kendan í Finlandi sum ein sera sjónligur og dugnaligur profilur í m.a. annað finskum lógar-, mannarættinda- og europapolitikki. Hann er formaður í mannarættindanevndini hjá Europaráðnum og hevur verið umboðsmaður tess í Rumenia. Í ES samanhangi er hann finnlendskt umboð og varaformaður í tí europeiska konventinum, sum skal skriva uppskot til lóg um grundleggjandi rættindini í ES, tað sum millum manna ofta verður rópt ES-grundlógin.

Í farnu vikuni viðgjørdi Gunnar Jansson í tíðindaskrivi í álendsku bløðunum og í samrøðum við álendska útvarpið støðu Álands í ES sum eitt lítið sjálvstýrandi oyggjaland, nú Europeiska Samveldið stendur framman fyri møguliga at skula víðkast úr 16 upp í 28 lond.

Jansson sær stórar vansar fyri framman. Í einum víðkaðum ES minkar bæði umboðanin og ávirkanin hjá serliga teimum smáu statunum. Tingmannatalið í Europatinginum hjá núverandi limastatunum fer í sambandi við víðkanina at minka við einum triðingi. Og hjá teimum sjálvstýrandi (autonomu) økjunum kunnu allir møguleikar fyri ávirkan hvørva. Áland hevur talað fyri at Finland skal lata Álandi eitt av teimum 18 finsku umboðunum í Europatinginum. Hetta fer at vera ógjørligt at fáa ígjøgnum, tá finska umboðanin minkar niður í 13 umboð. (Fólkatalið í Álandi er hálvt prosent av tí finska).

Einasta pallur í ES-skipanini í dag, har Áland hevur beinleiðis møguleika fyri at føra fram síni sjónarmið, er tað sokallaða Landspartaráðið, á svenskum Regionkommitén. Hetta er tó fyrst og fremst eitt forum fyri samrøðu millum landspartastýri í Europa. Ráðið hevur einki formelt vald og kann bert koma við áheitanum og tilmælum til ráðandi ES-myndugleikarnar. Men sjálvt her er torført hjá einum lítlum øki sum Álandi at koma ígjøgnum, tí meginparturin av limunum í ráðnum umboða landspartar, sum hvør sær eru størri enn alt Finland, eitt nu týsku bundeslondini og sponsku regionalparlamentini.

Í løtuni arbeiðir ráðið fyri, at teir landspartar og tey sjálvstýrandi øki, ið hava egin lóggevandi ting, skulu fáa sjálvstøðugan talurætt fyri ES-dómstólinum, tá ið limastatirnir ikki virða rættindini hjá teimum sjálvstýrandi økjunum/landspørtunum. Men einki bendir í løtuni á, at ráðið fer at fáa tillutað nakran beinleiðis myndugleika á hesum økinum heldur.

Jansson eggjar álendingum at stríðast fyri størri rættindum og meiri beinleiðis ávirkan í ES. Hann metir, at Álendska løgtingið og landsstýrið mugu gera seg hoyrd í sambandi við stjórnarráðstevnuna, sum ES heldur í ár fyri at fastleggja eina nýggja samveldisskipan við atliti til tað økta talið av limalondum, sum væntandi verður um nøkur ár. Annars missir Áland kanska allar framtíðar møguleikar fyri ávirkan á egin viðurskifti í ES.

Men hvørjar eru álendsku royndirnar av ES-limaskapinum higartil?

Áland valdi at fylgja við Finlandi inn í ES 1. januar, 1996. Í sambandi við innlimanina fekk Áland týðandi sømdir, sum hava búskaparligar fyrimunir við sær, ið ikki finnast aðrastaðni í ES. Týdningarmest vóru varðveitanin av álendska heimbygdarrættinum, ið tryggjar at bert borgarar, ið búgva og hava havt fastan bústað á Álandi í minst 5 ár út í eitt, hava loyvi at keypa fasta ogn og reka vinnuvirksemi á oyggjunum. Hin var varðveitanin av tax-free søluni eftir, at hon varð avtikin í restini av ES tann 1. juli í fjør. Heimbygdarrætturin tryggjar, at skergarðstrendurnar, ið eru sera væl umtókt og eftirtráaði frítíðarøki hjá bæði álendingum og útlendingum, ikki verða keyptar upp av svenskum og finskum ríkfólki. Tax-free undantakið tryggjar lønsemið hjá álendsku reiðaríunum, sum sigla við risaferjum millum Svøríki og Finland um Áland.

Men ES hevur samstundis víst seg at vera eitt tvíeggjað svørð fyri álendska sjálvstýrið. ES ger ikki mun á sjálvstýrandi økjum og vanligum landspartastýrum, og tí má alt samskifti millum ES og tey sjálvstýrandi økini ganga um statsstjórnirnar. Og fyri Áland hevur hetta havt við sær, at vald og avgerðarrættur, sum annars var komin á álendskar hendur er gliðin aftur til Helsingfors. Talað verður um ein sonevndan valdsleka í sambandi við ES-innlimanina. ES góðtekur bert ein aðalmyndugleika í hvørjum limastati fyri hvørt umsitingarøki. Tað merkir, at hóast t.d. fiskivinnulóggáva er yvirtikið øki sambært álendsku sjálvstýrisskipanini, so viðurkennir ES bert finsku fiskivinnumálaráðið sum part og myndugleika, tá avgerðir skulu takast í viðurskiftunum millum Áland og EU á hesum øki. Um álendskir myndugleikar vera hoyrdir í tílíkum førum, verður avgjørt á stjórnarskrivstovunum í Helsingfors, ofta á embætismannastigi.

Álendsku royndirnar higartil sum limir í EU vísa, at møguleikarnir at gera seg hoyrdan og at ávirka egin viðurskifti eru sera avmarkaðir hjá einum lítlum, sjálvstýrandi landi ella øki. Og framtíðarútlitini eru einki mætari.

Í Føroyum hevur hugurin at fara upp í ES verið sera avmarkaður orsakað av fiskivinnupolitikkinum. Kortini hoyrir tú oftari og oftari alment og millum manna tankan vera havdan á lofti — víst verður til marknaðaratgongdina v.m.

Í hesum sambandi er ein týðulig niðurstøða at draga burtu úr álendsku royndunum. Vil ein teinkja tankan til enda, at Føroyar skulu gerast partur av ES, so ber ikki til í verki at varðveita verandi stýrisviðurskifti millum Føroyar og Danmark. Tað má antin gangast fram ella bakkast. Antin fara upp í sum ein egin statur, ella aftur knýta seg tættari at Danmark og ein —í ES-samanhangi- vanligur danskur landslutur.

**Mikkjal Helmsdal,**
**Áland**

post@sosialurin.fo



## FØÐINGAR

21. februar fingu Rudi Øre og Hans Atli Dahl, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3940 gr.

23. februar fingu Súsanna Marjunardóttir og Bogi Jacobsen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

23. februar fingu Evona og Arni Nielsen, Fámjin, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

23. februar fingu Haidi T. Olsen og Harley Joensen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3800 gr.

24. februar fingu Rúna Sólheim Petersen og Heine Larsen, Ikast, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 3700 gr.

24. februar fingu Nanna Norðoy Lind og Claus Bjørklund Lind, Argir, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3550 gr.

24. februar fingu Sylvia og Ivan Isaksen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3400 gr.

25. februar fingu Paula Holm og Aðalstein Bjørnsson, Reykjavík, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4035 gr.

25. februar fingu Lis H. og Fróði Magnussen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

25. februar fingu Malan og Menning Geyti, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4300 gr.

25. februar fingu Helga og Svend Andreasen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3875 gr.

25. februar fingu Tove og Dánjal Tausen, Hoyvík, ein son. Hann var 45 cm. langur og vigaði 2185 gr.

26. februar fingu Eva H. Bennicke og Ernst Jacobsen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

26. februar fingu Annita á Fríðriksmørk og Páll Olsen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

27. februar fingu Ann H. Mortensen og Dagfinn Joensen, Ålborg, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3580 gr.

27. februar fingu Alma Joensen og Dan Pedersen, Skála, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4050 gr.

27. februar fingu Asta Kristjansdóttir og Tróndur Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2400 gr.

28. februar fingu Sigrid og Jákup Martin Poulsen, Hvannasund, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

28. februar fingu Jenni Hattarstein, Miðvágur og Allan Eldevig, Sandavágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

28. februar fingu Rachel og Ejler Eysturtún, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

29. februar fingu Jórun og Kaj Leo Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

29. februar fingu Jóna Dalsgarð og Høgni í Stórustovu, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

1. mars fingu Rigmor Dam og Arnbjørn Ó. Dalgarð, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

1. mars fingu Óluva Niclasen og Høgni Jensen, Velbastaður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4530 gr.

1. mars fingu Rúna á Lofti og Heðin Askham, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3100 gr.



15. okt. bleiv hesin fitti beiggin føddur. Foreldrini eru Guðrið Sólheim Petersen og Brian Væring, Ikast. Beiggin eitur Patrick.

## ANDLÁT

23. februar:
**Poul Martin Joensen,** Fuglafjørður, 79 ár
24. februar:
**Sanna Leo,** Vágur, 82 ár
27. februar:
**Adolf Viðbjørg,** Klaksvík, 73 ár
**Ella Rasmussen,** Søldarfjørður, 97 ár
**Anna Katrina Djurhuus,** ættað úr Porkeri, búsitandi í Vági, 83 ár
28. februar:
**Nanni Herta Thomasia Joensen,** Vágur, fødd Stenberg, ættað úr Sumba, 57 ár
**Elisabeth Hjelm Mortensen,** 81 ár
29. februar:
**Anna Kathrina Heinesen,** Leirvík, 81 ár
**Bergitta Joensen,** Klaksvík, nevnd Gitta, ættað av Hellunum, 78 ár

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Sunnudagur í føstuinngangi

*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altargangur, Bergur D. Joensen
*Kaldbak:* kl. 12, lestur (av M. Luther, í samb. við 1000-ára hald um kristniboðan í Føroyum)
*Nólsoy:* kl. 12, lestur (av M. Luther, í samb. við 1000-ára hald um kristniboðan í Føroyum) Talvan gongur fyri Heimamissiónina
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Húsar:* kl. 12, lestur eftir Martin Luther
*Hósvík:* kl. 12, altarg.,
*Kvívík:* kl. 15, familjugudstænasta við altargongd, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Miðvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Funningur:* kl. 12 messa,
*Gjógv:* kl. 17 messa, Emil Olsen
*Tvøroyri:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Rasmussen
*Fámjin:* kl. 12, Petur M. Rasmussen
*Viðareiði:* kl. 12, Meinhard Bjartalíð (Talvan gongur fyri føroysku sjómanskirkjuna)
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen.

(Innsavnan í Gøtu kirkju til Heimamissiónina)

(Haldórsvíkar kirkja. Komandi sunnudag gongur talvan fyri Heimamissiónina).

### Frá Ebenezer

Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

Sunnudag kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13: Sunnudagsskúli, kl. 19: Møti.

### Missiónsvikan á Hvítanesi

verður 31. mars-2. apríl.

### Rhema á Hálsi

Fríggjakvøldið kl. 18-19 ATAP. Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli.
Mánadag til fríggjadag kl. 6: Morgunbøn. Øll eru vælkomin.

### Hebron, Argir

Sunnudagin kl. 18: Røðin »Samkoman syngur« – sálmar eftir Frances C. Havergal. Evald Sørensen skipar fyri.
Hugnaløtan fyri tey ungu, ið skuldi vera mánadagin 6. mars, er útsett eina viku, til 13. mars.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 09.00 lovsongsráðstevna, kl. 14.00 lovsongsráðstevna, kl. 20.00 lovsongskonsert. Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgunmøti, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla er sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti, har Sangbrøður luttaka.
Mánamorgunin kl. 6-7, bøn hjá Magnus og Miu, Áargeil 15. Bønarmøti kl. 20 hjá Mariannu og Sámal av Reyni, Varðabyrgi 14. Verið øll hjartaliga vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma v/ teimum fýra.
Mánadagin kl. 16 í KFUK: Várgleði fyri børn

### Meinigheitshúsið í Havn

Sunnukvøldið kl. 18: Møti. Innsavnan til húsið. Týskvøldið kl. 20: Bíbliutími. Evni: Missión áðrenn Jesu afturkomu.

### Zion, Kollafjørður

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Øll eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna

Sunnudagin kl. 18: Møti.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti.

### Samkoman Ørkin

Evangelisk møti verða í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará sunnudagin kl. 17 v/ Jón Miðberg, sum talar og syngur.
Húsmøti verður týsdagin kl. 20.00 hjá Irenu Bech, Rituvík.

### Meinigheitshúsið á Skála

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við Emil Olsen, presti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 er møti.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

### Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21: Opið hús, ungdómur úr samkomuni í Hoyvík luttekur.
Sunnudagin kl. 17: Møti v/ Paula Høj, barnamøti kl. 17. http://kort.olivant.fo/~keldan/
Ungdómslega verður í Kelduni 10.-12. mars. Ald-ursmark 14 ár og uppeftir. Tekningarlisti liggur frammi í Kelduni. Meir fæst at vita á http://heima.olivant.fo/~arnia/lega.htm

### Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum

Møti og 25 ára hald verður sunnukvøldið kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Funningur

Leygardagin kl. 16: Barnamøti v/Regin Høgnesen, kl. 20: Møti v/Regin Høgnesen, Hanus og Maria syngja.
Sunnudagin kl. 15: Sunnudagsskúli, kl. 18: Møti, Nils Jacob Nilsen talar, Leila Højgaard syngur, innsavnan til heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltøkini.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli. Kl. 18: Møti við Helenu og Kára. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting, kl. 13.30: Sunnudagsskúli, kl. 18: Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20: Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20: Kvinnufundur.
Ónsdagin kl. 20: Uppbygg. fundur.

### Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

### Vitnið, Hvalba

Møtirøð við Osvald Kjærbo byrjar sunnudagin. Evangeliskt møti sunnudagin kl. 18. Mánadagin, týsdagin og mikudagin verða møti kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gamli skúli í Hvalba

Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn halda Evangeliskt møti mánadagin kl. 19.30 og mikudagin kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betania, Porkeri

Kvinnumøti verður mánakvøldið kl. 20.00.

### Hirtshals

Føroyskt møti verður í missiónshúsinum fríggjakvøldið 10. mars kl. 19.30 í Hirtshals v/Hera Elttør, trúb. Kaffi og hugnaløta eftir møti. Øll eru vælkomin.

### Ålborg

Føroyskt møti verður í missiónshúsinum í Ålborg (Jernbanegade 16) sunnudagin 12. mars kl. 17 v/Hera Elttør, trúboðara. Kaffi verður eftir møti. Øll eru vælkomin.

### Kolding

Føroyski trúboðarin Heri Elttør tala við møti í Kolding missiónshúsi 6. og 7. mars kl. 19.30. (Missiónshúsið Bethel liggur á Tøndevej 5). Øll eru vælkomin.

## Prógv

**Vár Róin, Fuglafjørður, hevur lokið prógv sum laborantur. Ástøðiliga partin í Århus og starvslæruna á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í Tórshavn.**

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 4. mars:* Magnus á Stongunum, tlf. 423006
*Sunnudagin 5. mars:* Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

**Norðoyggjar:**
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.